# Sangglaður ungdómur savnar fløskur til summartiltak



*Felagsskapurin er góður í Sound of Glory. Í summar fáa tey høvi at fáa nýggjar vinir, tá tvinni norsk kór koma á vitjan*

**Tensingkórið »Sound of Glory« í Havn fær forvitnisliga vitjan úr Noregi í summar, tá tvey vinakór koma á vitjan. Til hetta tiltakið krevst sjálvandi peningur – og tómar fløskur!**

KÓRVIRKSEMI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Hesar komandi dagarnar kunnu fólk í Havn vænta at fáa eina heldur sjáldsama vitjan.

Uttanfyri standa nøkur frísk ungfólk, sum eru í ferð við at savna inn fløskur til eitt gott endamál.

Og tað góða endamálið er eitt summartiltak fyri sangglaðan ungdóm, sum kórið »Sound of Glory« í KFUM í løtuni er í ferð við at fyrireika.

Hetta er eitt tiltak har hetta tensing-kórið fær vitjan av tveimum vinarkórum úr Noregi, og har tey fara at syngja saman og annars hugna sær saman úti og inni.

– Vit royndu hetta við innsavningini av fløskum í 2003, tá vit fóru til Pragh. Og tað eydnaðist so mikið væl, at vit hava hug at royna aftur í ár, sigur Meinhard Arge, ein av monnunum handan Sound of Glory Tensing.

### Samanhald

Fløskuinnsavningin fer fram á tann hátt, at teir ungu kórlimirnir fara at ganga hús úr húsi og spyrja, um fólk liggja inni við tómum fløskum.

Byrjað verður í kvøld og verður hildið á til leygardagin. Henda dagin hava fólk eisini sjálvi høvi at koma við fløskum niðan í KFUM, har kórlimirnir fegnir taka ímóti teim.

Hetta sama varð gjørt í 2003, og tá upplivdu tey í kórinum at samanhaldið gjørdist munandi betri, tí tey ungu nú høvdu eitt felags mál at arbeiða fram ímóti.

Hetta gjørdi helst eisini sítt til, at túrurin í Pragh varð so sera góður.

### Norsk vitjan

Í summar er ætlanin at skipa fyri hesum summartiltakinum, tey nevna »FO:05«, har tvey vinakór úr Noregi koma á vitjan, - Hinna Tensing og kórið við tí heldur sjáldsama navninum »Bukkende Bruse« úr økinum nærhendis Stavanger.

Í Sound of Glory hava teir ungu kórlimirnir sjálvir arbeitt í longri tíð við at fyrireika hetta tiltakið, sum verður í døgunum 20. til 27. juli.

Ætlanin er at vísa norsku gestunum ein stóran part av landi okkara, men tað størsta tiltakið verður uttan iva tann stóra konsertin í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 25. juli.

Har fara hesi trý kórini at syngja hvør sær og saman, og tí er líkt til at øll fáa eitt spennandi kvøld í Norðurlandahúsinum. Umframt glaðan gospelsang verður eisini drama, dansur og annað á skránni hetta kvøldið.

Sound of Glory hevur venjingar sínar hvørt mikukvøld kl. 19 í KFUM. Og sagt verður, at nýggir sangarar eru vælkomnir við.

## Nýggjur sjálvhjálparbólkur

**Týskvøldið 19. apríl verður hugnaløta fyri kvinnur, sum hava ella hava havt krabbamein í undirlívinum**

SJÁLVHJÁLPARBÓLKUR
*tíðindaskriv*

Ein nýggjur bólkur er nú stovnaður undir Føroya Felag móti Krabbameini. Bólkur-in er fyri kvinnur, sum hava ella hava havt krabbamein í undirlívinum.

Endamálið við bólkinum er:

1. at hesar kvinnur koma saman at tosa, stuðla og hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp.
2. at vera málgagn og fremja áhugamál hjá kvinnum við krabbameini í undirlívi, mótvegis myndugleikum og heilsuverki
3. at savna vitan og royndir á øllum økjum, hvat viðvíkur krabbamein í undirlívi
4. at fremja upplýsandi og vegleiðandi virksemi um krabbamein í undirlívi

Bólkurin hevur gjørt av at skipa fyri eini hugnaløtu umleið sættu hvørja viku fyri kvinnur, sum hava ella hava havt krabbamein í undirlívi.

Endamálið við hugnaløtuni er at hava eina hugnaliga løtu saman. Og at hesar kvinnur koma saman at tosa, stuðla, hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp.

Hugnaløtan verður í hølunum hjá Føroya Felag Móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Tórshavn týskvøldið 19. apríl 2005 kl. 19.00.

Tey, sum ynskja at taka lut í tiltakinum, verða biðin um at boða frá á tlf. 317959 ella á 217959

## Sjónleikaraskeið fyri ung

**• roynd sum óroynd**

SJÓNLEIKARASKEIÐ
*tíðindaskriv*

Nú er aftur eitt spennandi sjónleikaraskeið fyri ung, ið hava hug at royna seg á sjónleikarpallinum.

Frá morgni til myrkurs verður improviserað, spælt og agerað.

Við Eyð Matras sum undirvísara í »improvisatión« og Hjørdis Johansen sum undirvísara í »teatersport«, verður lagt upp til spennadi og stuttligar avbjóðingar.

Hevur tú hug til eitt øðrvísi vikuskifti við látri og avbjóðingum, so er hetta nakað fyri teg.

Um tú ongar royndir hevur innan sjónleik, er tað nú tú skalt melda teg, - og hevur tú royndir innan sjónleik, er tað upp á tíðina at tú meldar teg.

Skeiðið verður hildið 8.-10. apríl í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík, og gist verður í Skótahúsinum.

Tú fært meira at vita um skeiðið, um tú vendir tær til MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, tlf. 315624, maf@maf.fo, www.maf.fo.

# Bussarnir koyra

**Hóast fleiri bíðaðu til fánýtis eftir bussinum týsmorgunin, so koyra bussarnir, tað sigur Bogi Haraldsson á teknisku deild hjá býráðnum**

BUSSLEIÐIN
*eydna@sosialurin.fo*

Hóast ferðslan framyvir darvað av kloakkarbeiðnum í miðbýnum, so fara býarbussarnir at koyra sum vant. Bygdaleiðir og onnur tung ferðsla sleppa tó ikki at nýta Steinatún sum farleið komandi 8 vikurnar.

Av tí at ein misskiljing var íkomin týsdagin um eina av bussleiðunum í Tórshavnar Kommunu, eru fólk farin at ivast í, hvørt bussarnir fara at koyra komandi átta vikurnar, tá vegarbeiðið fer fram.

Bogi Haraldsson á býráðnum kann tó sláa fast, at bussleiðin fer at koyra sum vant.

– Ferðslan fer sjálvsagt at verða darvað nakað, men bussleiðin fer at koyra. Bussarnir, ið koyra omanígjøgnum Bøkjarabrekku koyra sum vant, meðan bussarnir, ið koyra frá Jóannesar Paturssonargøtu gera eina lítla broyting. Í staðin fyri at steðga í Steinatúni sum vant, snara teir nú um hornið við Frelsunar Herin, og steðga í Tórsgøtu í staðin, upplýsir Bogi Haraldsson á teknisku deild.

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i